gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Endurskoðað kappingarreglurnar

**Ein nevnd undir Flogbóltssambandi num verður nú sett at endurskoða kappingarreglurnar fyri yngru liðini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Flogbóltssamband Føroya hevði aðalfund um vikuskiftið, og eitt av føstu málunum á skránni var sjálvandi val av nevnd. Formaðurin í FBF, Niclas Joensen, stóð ikki fyri vali, men nevndarfelagar hansara skuldu veljast av nýggjum. Hetta viðførdi tó onga broyting, tí bæði Magnus Tausen, skrivari, og Trygviu H. Poulsen, kappingarleiðari vórðu einmælt afturvaldir. Tiltakslimir í nevndini eru Jónsvein Nielsen og Rúni Weihe, báðir úr Havn.

Størsta málið á fundinum tóktist framman undan at vera viðgerðin av kappingini hjá yngru deildunum, og tað vísti seg eisini, at hetta málið fekk eina drúgva viðgerð á fundinum.

Fleiri uppskot vóru komin inn um hetta evnið, og størsta broytingin verður í fyrsta umfarið, at tað frá komandi kappingarári verða fleiri kappingar, sum fara at telja í stríðnum um føroyameistaraheitið. Áður hevur tað bert verið tann eina kappingin, sum hevur avgjørt, hvør kann rópa seg FM vinnara, men framyvir verður talan um fimm kappingar.

Hesar verða í fyrsta umfari kappingarnar hjá TB, Fleyr, Mjølni og Drátti, umframt eina nýggja kapping, sum FBF sjálvt skal skipa fyri.

Annars samtykit aðalfundurin eisini, at ein serstakur bólkur skal gjøgnumhyggja alt konseptið, sum flogbólturin hjá yngru liðunum í dag koyrir eftir. Í Flogbóltssambandinum fegnast tey annars um, at tilgongdin av yngru leikarunum hevur verið sera stór seinnu árini, men hinvegin hevur framgongdin einamest umfara gentulið, og spurningurin er so, um nakað kann gerast, til tess at eisini fleiri dreingir skulu fara undir flogbóltin.

Alt hetta setir tó eisini onnur krøv um tilrættisleggjan og annað, og tí gjørdi aðalfundurin altso av at seta ein bólk at kanna málið., Ætlandi skal bólkurin verða liðugur við arbeiðið seinast í mei mánaði.

## Gott flogbóltsár

Annars frøddist nevndin í FBF um, at undanfarna kappingarár hevur verið sera virkið, hvat flogbólti viðvíkur. Veddingarpengarnir úr Danmark hava eiga so avgjørt sín stóra lut í hesum, verður sagt, og í formansfrágreiðingini varð nortið við, hvussu stóran týdning tað hevur, at myndugleikarnar á økinum ikki fara at lækka stuðulin til ítróttin av hesi orsøk. Eitt nú hevur FBF í ár havt møguleika at senda A-landslið til C-EM kappingina, eins og aktiviteturin fyri yngru landsliðini hevur veirð størri enn undanfarin ár.

Sum nakað nýtt, fer FBF nú undir eina skipaða venjaraútbúgving. Klæmint Isaksen er settur at taka sær av samskipanini í hesum, og verður hetta gjørt í samstarvi við danska flogbóltssambandið. Hetta merkir, at umframt grundútbúgvingina, sum er tann, sum FBF skipar fyri, er møguleiki hjá venjarunum at útbúgva seg víðari innan skipanina hjá danska sambandinum. Hetta verður so avgjørt mett sum eitt øki av stórum týdningi, og tí má tað sigast at vera gleðiligt, at Flogbóltssambandið nú fer undir eitt miðvíst arbeiði á hesum økinum.

B68–B36 2–3 (0–0)

# Lívligt seinna umfar á Toftum



*B36 leikararnir kundu sunnudagin fegnast um, at tað hevur eydnast teimum at leikt seg í hálvfinaluna í kappingini um Løgmanssteypið*

**Eftir at hvørki liðið í fyrra umfarinum hevði torað at slept verjupartinum læt eitt mál tíðliga í 2. hálvleiki upp fyri nógvum álopsspæli**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

B36 saman við fleiri enn hálvt hundrað viðhaldsfólkum fóru í góðum hýri av Toftum sunnudagin. Teirra lið hevði kvalifiserað seg til hálvfinalurnar ímóti grannunum úr HB. Í tveimum løtum sá tað út til, at B36 skuldi vinna tryggan sigur, men báðu ferðirnar svaraði heimaliðið aftur, og tí var tað sera undirhaldandi og spennandi í 2. hálvleiki.

Fyrra umfarið var einki at skriva um. Tað var sera sjónskt, at hvørgin parturin vildi dumma seg í verjupartinum. Tí var fyrru trý korterini millum lítið og einki av skipaðum álopsspæli, og málmøguleikarnir vóru fáir og smáir. Arnold Joensen hjá B68 fekk ein møguleika beinanvegin. Hevði hann havt skoraði, hevði dystargongdin sjálvandi tørnað øðrvísi út. Hann skoraði ikki, og so var talan um tómgongd. Hvørki liðið megnaði at bróta ígjøgnum í borðunum, og tá tað endiliga eydnaðist var millum lítið og einki fólk at taka ímóti undir málinum.

Hjá B68 vóru Hans Fróði Hansen og Jan C. Dam í miðverjuni, og Jan Petersen og Messias á vongverjunum. Tað tóktist ivaleyst at taka sær av Jákupi á Borg og eitt sindur skadda Magna á Lakjuni, sum vóru einsamallir á B36 toppinum, meðan John Petersen, sum spældi ímillum teir báðar, ofta var væl longri afturi á vøllinum.

Hvørki Súni Fríði Johannesen ella Marcello Marcellino vóru tøkir. Tí var Mortan Hansen einsamallur á toppinum. Miðvallarspælararnir Arnold Joensen í høgru, Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen og John Heri Dam, sum var ytstur í vinstri, royndu at skiftast um at stuðla einsamalla manninum á toppinum, men tað tóktist ikki at vera serliga lætt.

## Undirhaldið

Tá B36 kom á odda, høvdu B68 menninir fingið varskó um, at tað kundi kiksað. Heðin á Lakjuni, sum eftir anonyman 1. hálvleik var sera sentralur í seinna umfarinum, fór ígjøgnum, men Magnus Poulsen refleksbjargaði, tá Jákup á Borg úr púra leysari støðu royndi at umseta flata innleggið. Bólturin stakk út frá, langskotið var gott, men Magnus fekk bent til horna.

Fyrsta leiðslumálið kom eftir uppspæl í vinstru. Heðin á Lakjuni legði flatt innfyri, bólturin streyk framvið málinum, og aftan fyri handara stólpan smekkaði Jan Guttesen – nú tykist hann ætla sær at skora á hvørjum ári! – upp í nettakið.

So hekk spælið betri saman hjá báðum pørtum. Øssur Hansen og Fróði Benjaminsen, sum við skoti úr 45 metrum rakti tvørtræið aftanfyri Trónd Vatnhamar, vóru frammarlaga, og B68 royndi at leggja trýst á. Men knappliga endaði B36 uppspæl í vinstru við øktari leiðslu. John Petersen og Jens Kristian Hansen vórðu báðir leysir á brotsteigarmarkinum mitt fyri, og tað var Jens Kristian, sum tykist vera komin seg heilt eftir skaðan, ið helt honum burtur frá landsliðnum, sum sendi í nettakið, meðan toftamenn vildu hava rangstøðu og kanska fríspark. Men tað helt dómarin avgjørt ikki.

So var 2–0, og uppgávan tóktist ómøgulig hjá B68. Eftir uppspæl borð úr borði og innlegg úr høgru minkaði Mortan Hansen um munin, og so var aftur spenningur í. B68 spenti álopsbogan, og B36 skoraði aftur í skjótálopi. Hesa ferð var tað innskifti Kenneth Jacobsen, sum sendi dygst framvið stólparótini, eftir uppspæl frá John Petersen og innskifta Egili Zachariasen. Innskifti Bogi Petersen sendi langskot í B36 málið, men toftamenn komu ikki nærri.

### Dysturin í tølum:

**B68-B36 2-3 (0-0)**
0-1: Jan Guttesen
0-2: Jens Kristian Hansen
1-2: Mortan Hansen
1-3: Kenneth Jacovbsen
2-3: Bogi Petersen

B68: Magnus Pouslen – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Jan C. Dam, Messias Perreira – Arnold Joensen, Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, John Heri Dam – Mortan Hansen
B36: Tróndur Vatnhamar – Herbert í Lon Jacobsen, Arnbjørn Danielsen, Jens Kristian Hansen – Klæmint Matras, Jan Guttesen, Pól Thorsteinsson, Heðin á Lakjuni – Jákup á Borg, John Petersen, Magni á Lakjuni

gult15 cyan15 magenta15 svart15



KÍ–ÍF 2–1 (2–1)

# ÍF gav harða mótstøðu

**Tað eydnaðist klaksvíkingum at vinna seg fram til hálvfinaluna í steypakappingini, men tað skuldu 90 spennandi minuttir til, áðrenn víðari luttøkan varð staðfest**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Tá lutur varð kastaður um fjórðingsfinalurnar í steypakappingini, mundi breið semja vera um, at klaksvíkingar vóru teir, sum høvdu fingið lættasta lutakastið. ÍF var einasta liðið úr aðru deild, sum framvegis var við í kappingini, so mette eftir hesum, skuldi talan verið um eitt yvirkomuligt mótstøðulið.

Hinvegin vistu klaksvíkingar av, at ÍF í ár hevur verið rættiliga væl fyri. Liðini hittust tvær ferðir í bólkaspælinum, og hóast KÍ vann hesar báðar dystirnar, so bendi avrikið hjá ÍF tá á, at liðið er betri fyri, enn teir hava verið seinnu árini. KÍ hevur hinvegin havt sínar trupulleikar við at spæla eitt nýtt lið saman. Stór útskifting hevur verið á liðnum í mun til í fjør, ungir leikarar eru settir við, so tað mundi ikki vera nakað at ivast í, at fuglfirðingar trúðu upp á møguleikan, tá teir fóru til Klaksvíkar.

## Øll málini í fyrra

Tá dysturin byrjaði, tóktist eisini greitt, at talan ikki á nakran hátt fór at gerast um ein lættan sigur til heimaliðið. Úr Klaksvík fréttist, at talan kanska ikki var um tað vakra fótbóltsspælið á vøllinum, men hinvegin tóktust bæði liðini veruliga at gera eina roynd at leggja trýst á mótpartin. Vegna ov nógvar skeivar sendingar og basalar persónligar feilir gjørdist talan ikki um teir heilt stóru møguleikarnar, men hinvegin líktist tað ongantíð einum 0-0 dysti. Bæði liðini vóru framrættaði í útgangsstøðnum, og um miðjan fyrra hálvleik spurdist eisini úrslit burtur úr hesum.

KÍ fekk tá lagt seg á odda, eftir at Allan Joensen fyrst hevði snýtt ein fuglfirðing á miðvøllinum, fyri síðani at stinga fram til ein púra leysan Ova Nysted, sum kundi rullað í málið, eftir at hava rundað Ken Bærendsen í ÍF málinum.

Bert fimm minuttir seinni økti heimaliðið um leiðsluna, men hesa ferð var tað við góðari hjálp frá Ken Bærendsen í ÍF-málinum. Hjalgrím Elttør sendi eitt skot móti málinum. Í fyrstu atløgu støkk bólturin á tvørstongina, men tá málverjin so skuldi taka sær av bóltinum, misti hann onkursvegna takið á hesum, soleiðis at hann støkk inn í málið til 2-0.

Hetta var sum vátur vøttur at fáa hjá fuglfirðingum, men tað gekk tó bert ein lítil minuttur, áðrenn teir hvødu minkað munin niður í eitt mál. ÍF vann sær eitt hornaspark, og við nærmaru stong stóð Viggo Johannesen og stútaði í kassan, uttan møguleika hjá Meinhardt í KÍ-málinum at verja fyri.

## Á veg upp

Sum dysturin leið, skuldi tað vísa seg, at tað skuldi ikki vera talan um meira enn hesi trý málini, sum vórðu skotin miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Ikki tí, bæði liðini høvdu so avgjørt sínar møguleikar, og ikki minst komst hetta av, at talan var um ein rættiligan steypadyst.

Fuglfirðingar royndu áhaldandi at leggja trýst á KÍ-verjuna, og í royndunum at flyta spælið niðaneftir, viðførdi hetta sjálvsagt at umstøðurnar hjá KÍ at spæla kontrafótbólt batnaðu munandi. Við longum bóltum varð roynt at finna áleypararnar, men nærri enn einum skoti á stongina komu teir tó ikki. Hinvegin hevði ÍF ikki minni enn tvey skot á samankomingina, men sum kunnugt telur hetta ikki við, tá endaliga úrslitið skal gerast upp.

Hóast tað sostatt gjørdist til eitt farvæl fyri ÍF í steypakappingini, so skerst ikki burtur, at fuglfirðingar í ár hava tilfar til at vinna seg upp aftur í bestu mansdeildina. Avrikini í steypakappingini hava verið góð móti liðum úr bestu deildini, og millum annað tveir sigrar á sandoyingum boða frá, at liðið avgjørt hevur møguleika at standa seg í bestu deildini.

### Dysturin í tølum

**KÍ-ÍF 2-1 (2-1)**
1-0: Ove Nysted
2-0: Sjálvmál
2-1: Viggo Johannesen

Dómari: Oddmar Andreasen

KÍ: Meinhardt Joensen – Atli Danielsen, Símun W. Høgnesen, Niclas Niclassen (Erling Fles 45.(Rúni Elttør 90.)) – Símun Joensen, Jan Joensen (Eyðun Klakstein 62.), Fríðin Ziskason, Allan Joensen, Harley Bertholdsen – Ove Nysted. Hjalgrím Elttør
ÍF: Ken Bærendsen – Tomek Prybilscki, Áki Petersen, Viggo Johannesen – Torstein Joensen, Eyðolv Petersen, Roy Róin, John Thomsen (Hanus Eliassen 80.) – Høgni á Lakjuni, Heini Heinason, Bárður á Lakjuni

# Steypavinnarararnir sendir úr kappingini

**NSÍ megnaði ikki at fáa úrtøku burtur úr leikligari yvirvág, men í brotssparkskappingini lógu teir á gøtumonnum, sum harvið søgdu farvæl til møguleikan at endurvinna løgmanssteypið**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

GÍ vann løgmanssteypið í 2000. Gí fer ikki at vinna løgmanssteypið í 2001. Tað gjørdist greitt sunnukvøldið, tá talan var um heilt nógva ferðslu kring fótbóltsvøllin í Runavík. Meðan ein rúgva av fólki var á veg til møti í ítróttarhøllini, vóru onnur á veg av vøllinum.

Viðhaldsfólkini hjá NSÍ fegnaðust um, at tað hesa ferð hevði eydnast teirra liði at fingið bilbukt við GÍ.

Viðhaldsfólkini hjá GÍ vóru ørkymlaði. Eitt var tað, at teirra lið hevði mist møguleikan at endurvinna løgmanssteypið. Nakað annað var tað, at dysturin ímóti NSÍ eftir øllum at døma kostaði tveimum og kanska trimum av føstu monnunum á liðnum næsta dystin. Tað verður í fyrsta umfarinum í landskappingini, tá GÍ skal spæla á útivølli ímóti KÍ.

Hjá GÍ var tað ein smeitur, at Óli Hansen noyddist at taka seg burturúr tíðliga í 2. hálvleiki í vanligu leiktíðini. Pólverjin, Marek Wegiel, sum kom í Ólasa stað, var alt annað enn sannførandi. Uggin er, at Óli Hansen ivaleyst verður tøkur komandi sunnudag. Tað vera Hans Pauli Petersen og Magni Jarnskor ikki. Hans Pauli fekk reytt kort eftir samanbrest við Djóna N. Joensen, og Magni fekk reytt kort, sjálvt um hann als ikki var við í dystinum (hann hevur síðstu vikuna verið plágaður av vøddaskaða). Tað var í yvirtíðini, at báðir gøtumenninir sóu reytt. Magni fekk kortið fyri at høggast við dómaran.

## Ongantíð í fimta giri

Tað er ikki so ofta, at tað kemur fyri í føroysku steypakappingini, at alt skal avgerast í einum og sama dysti. Tað sást á báðum liðunum, at tey vóru meiri bangin fyri at gera mistøk í verjupartinum, enn at spenna álopsbogan eitt sindur meiri. Málið, sum kundi loysa upp fyri hesum, kom ongantíð, og tískil var ongantíð talan um so at siga óbundið fótbóltsspæl við nógvari ferð.

Eftiransingarnar vóru tættar, og í nógvum førum varð einfaldasta loysnin vald. Tað vil siga, at bóltarnir ofta vóru høgir og langir.

Óli Hansen hevði í 1. hálvleiki tveir møgu-leikar at leggja GÍ á odda. Men í báðum førunum var tað eitt sindur fløkjasligt, og einki spurdist burturúr.

NSÌ hevði lítla leikliga yvirvág, og teir á heimaliðnum høvdu bóltin meiri. Christian Høgni Jacobsen er ein vandamikil ungur maður. Eina ferð í 1. hálvleiki var um reppið, at hann fekk hol á, men nýggi GÍ málverjin, Hallur Hansen, megnaði at halda tætt allar 90 minuttirnar og eisini í longdu leiktíðini.

Gøtumenn hava ofta verið drúgvari enn teir í NSÍ. Tí kundi tað kanska roknast við, at teir fóru at roynast betur í umdystinum, men tað gjørdu teir ikki. NSÍ tóktist hava breiðari hóp enn GÍ. So góðir fótbóltsspælarar sum Sonni L. Petersen, Brynjálvur Nielsen og Gert Langgaard komu inn á liðið hjá NSÍ.

Í brotssparkskappingini setti Sámal Joensen hol á fyri GÍ, og Christian Høgni Jacobsen javnaði. Henning Jarnskor legði GÍ framum aftur, og so bjargaði Hallur Hansen skotinum hjá Kára Hansen. Bartal Eliasen sendi so við síðuna av NSÌ málinum, og so javnaði Ian Højgaard til 2–2. Poul Ennigarð skoraði til 3–2, Dánial Hansen javnaði til 3–3, og Jens Martin Knudsen bjargaði ikki serliga góðu royndini hjá Zdislaw Janik, og so var tað Gert Langgaard, sum sendi bóltin framvið bygdarmanninum úr Leirvík í GÍ málinum.



*Tað er ikki gerandiskostur hjá NSÍ at vinna grannauppgerðina móti gøtumonnum, men hesa ferð eydnaðist teimum so at vinna seg fram í hálvfinaluna í steypakappingini*
*Mynd: Jonhard Hammer*

### Dysturin í tølum

**NSÍ-GÍ 0-0**
NSÍ vann 4-3 eftir brotssparkskapping

NSÍ: Jens Martin Knudsen – Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Jónstein Petersen – Eddie Mikkelsen, Elian Hansen, Ian Højgaard, Sjúrður Jacobsen – Dánial Hansen, Christian Høgni Jacobsen
GÍ: Hallur Hansen – Leivur Hansen, Bartal Eliasen, Poul Ennigarð – Hans Pauli Petersen, Áslakur R. Petersen, Sámal Joensen, Zdislaw Janik, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen